# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Okkara eftirlitsmenn hava fingið vissu fyri, at norðurkoreanar hava stongt Yongbyon-kjarnorkuverkið*

*(Mohamed ElBaradei)*

# Harður jarðskjálvti í Japan

**Aftur í morgun fingu japanar eina áminning um, at teir búgva í heimsins ringasta jarðskjálvtaøki**



*Nógv hús vórðu oyðiløgd í tí harða skjálvtanum í morgun*

Jarðskjálvtin í morgun var so mikið harður, at fleiri bygningar í høvuðsstaðnum Tokyo skulvu, sjálvt um miðdepilin í skjálvtanum var 260 kilometrar frá býnum.

Skjálvtin, sum var 6,6 á Richter-stiganum, gjørdi stóran skaða. Í dag vistu myndugleikarnir um fýra fólk, sum høvdu latið lív, og at millum 300 og 400 onnur høvdu fingið skaða. Nærhendis Niigata-strondini vórðu nógv hús oyðiløgd, og á Kashiwazaki-kjarnorkuverkinum fóru allir ávaringarlúðrar í gongd, tá eldur kom í eina avbrótarastøð á verkinum. Tað eydnaðist kortini at sløkkja eldin, og í dag vóru eingi tekin um geiðslavirknan leka.

Eitt skifti stúrdu myndugleikarnir fyri, at jarðskjálvtin kundi elva til flóðeldur, og fólk vórðu ávarað um tað. Tað vísti seg, at nakrar flóðaldur komu, men tær vóru so mikið smáar, at tær gjørdu ikki skaða.

Japan er eitt tað ringasta jarðskjálvtaøki í heiminum. Tann ringasti skjálvtin var í Tokyo í 1923, tá umleið 140.000 fólk doyðu. Japanskir jarðfrøðingar siga, at tað er 90 prosent sannlíki fyri, at ein harður jarðskjálvti fer at raka býin innan 50 ár.

### 30 druknað í Kina

Í grannalandinum Kina ger náttúran eisini vart við seg í hesum døgum.

Oysregn um vikuskiftið hevur kostað minst 30 mannalív har eysturi í landinum, og veðurmenninir siga, at tað fer eisini at regna teir næstu dagarnar. Umleið 600.000 fólk eru vorðin heimleys, og myndugleikarnir hava sent 300.000 hermenn at hjálpa teimum neyðstøddu. Higartil í ár hevur gloprarregn kostað 403 kinesarum lívið, og umleið tríggjar mió. fólk hava mist hús og heim.

# Eitur í tekannuna

**Tænarin, sum setti te á borðið hjá Alexander Litvinenko, heldur, at eitur var í kannuni**

- Tá eg stoytti tað, sum var eftir í kannuni, burtur, sá eg, at tað var tjúkt og gult á liti, sigur tænarin á matstovuni á Millenium-gistingarhúsinum í London við blaðið The Sunday Telegraph.

Kanningarnar hjá bretsku løgregluni hava víst, at tað er væl hugsandi, at fyrrverandi KGB-maðurin Alexander Litvinenko bleiv eitraður av onkrum, sum hann át ella drakk á Millenium-gistingarhúsinum, og sum kostaði honum lívið tríggjar vikur seinni.

Norberto Andrade, sum var tænari hendan dagin, sigur við The Sunday Telegraph, at hann bleiv órógvaður, tá hann skuldi seta tekannuna á borðið hjá Litvinenko, og at onkur kann hava koyrt eitur í kannuna tá.

-Tað, sum var eftir í kannuni, var gult á liti og tjúkt, sigur Norberto Andrade við blaðið.

Bretska ákæruvaldið heldur, at Alexander Litvinenko bleiv eitraður, tá hann hitti tríggjar russarar á Millenium-gistingarhúsinum tann 1. november í fjør. Tann 23. doyði hann.



*Alexander Litvinenko*

## STUTT SAGT

### Nógvar fosturtøkur

Á hvørjum ári verða umleið hálv onnur mió. børn fødd í Russlandi, men hagtøl hjá tí almenna vísa nú, at hvørt einasta ár eru tvær mió. fosturtøkur, og verða tær ólógligu fosturtøkurnar taldar uppí, er talið helst tríggjar mió. um árið. Við øðrum orðum velja tvær av trimum russiskum kvinnum fosturtøku fram um at eiga barnið. Norska blaðið Aftenposten skrivaði um vikuskiftið, at nógvar russiskar kvinnur tora ikki at brúka nakað fyribyrgjandi, tí millum annað fáa tær at vita, at P-bollarar kunnu elva til krabbamein.

### Kenna seg sviknar

Marianne Jensen, sum er grønlendskur tinglimur, heldur, at danir gera ov lítið fyri grønlendingar, sum búgva í Danmark. Við grønlendska útvarpið sigur hon, at í 1996 skrivaði Danmark undir ein sáttmála, sum staðfestir, at grønlendingar eru eitt serstakt fólk í danska ríkinum, og at teir skulu virðast sum eitt fólk. Marianne Jensen heldur ikki, at danir hava hildið sáttmálan, og at teir tí mugu átaka sær ein part av ábyrgdini av, at nógvir grønlendingar hava ilt við at fóta sær í Danmark.

### Flutt undan regni

Tað er ikki á hvørjum degi, at danskir ráðharrar mugu flyta undan regni, men tað hendi um vikuskiftið, tá Connie Hedegaard, umhvørvismálaráðharri, mátti rýma úr einum summarbústaði í Svøríki, tí vandi var fyri, at ein bygning fór at skrædna eftir áhaldandi regn.